# Tosa um at missa børn

**Tað er sera týdningarmikið fyri foreldur, sum mist hava børn, at tey tosa um hesi viðurskiftini og ikki royna at gloyma barnið. Til tess at hjálpa skipar Felagið Pinkubarnadeyði fyri fundum, har foreldur hittast at tosa um felags viðurskifti**

PINKUBARNADEYÐI
*Eirikur Lindenskov*

Felagið Pinkubarnadeyði hevur opið hús annan leygardag í hvørjum mánaði. Har hava fólk møguleika at hitta onnur foreldur, ið hava mist eitt barn. Har verður m. a. tosað um persónligar reaktiónir og reaktiónir, tú upplivir, tá ið tú fert til arbeiðis aftur.

Nakrar ferðir um árið verður skipað fyri professionellum fyrilestrum, t. v. s. við presti, sjúkrasystir, jarðarmóðir, sálarfrøðingi o. l. Annars eru tað tey aktivu í felagnum, ið siga frá sínum upplivingum í sambandi við sorg.

Foreldur, ið hava mist eitt barn, verður ofta biðin um at fara til arbeiðis skjótast gjørligt ella takast við eitthvørt, fyri at gloyma barnið og koma víðari í lívinum.

– Hetta nyttar lítið, um sorgin als ikki er viðgjørd. Tí tað hendir ofta, at foreldrini virka ikki til arbeiðis og tískil verða sjúkrameldað eina tíð fram. Tá kennist niðurlagið enn størri, sigur Annvør Nielsen úr Felagnum Pinkubarnadeyði.

Komandi leygardag, 14. september, fara Sonja Gleðisheygg og Hallbjørg Friálvsdóttir at tosa um evnið: »Hvussu er tað at byrja at arbeiða aftur, tá ið tú hevur mist eitt barn«.

Fundurin verður í Jákupsstovu í J. Paturssonargøtu 24 kl. 14 leygardagin.

Um fólk vilja vita meira um felagið, ber til at seta seg í samband við Sólgerð Foldbo (tel 422184) ella Annvør Nielsen (tel 317261).

# LM-handilin hevði vakrasta básin



*Jóna Rasmussen, listarkvinna, Arnstein frá LM-Handlinum og Birgir og Lis Poulsen, fyrireikarar av Vørumessuni*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**Um vikuskiftið var skipað fyri Vørumessu í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn**

VØRUMESSA
*Eirikur Lindenskov*

Um vikuskiftið varð skipað fyri vørumessu í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn.

Messan lat upp fríggjadagin og var opin til sunnudagin kl 18.

Tað er Birgir Poulsen, sum skipar fyri Vørumessuni, sum serliga er ætlað handilsfólki.

Tað var eisini týðuligt, at jólakeypið stendur fyri durum.

Sum vera man merktist tað leygardagin, at fótbóltur var á skránni, men sunnudagin vitjaðu nógv fólk messuna. Har var eisini høvi hjá fólki at kjósa vakrasta básin, og vann LM-Handilin hendan heiður.

Í heiðursgávu fekk handilin eitt grafiskt prent, sum Jóna Rasmussen, listarkvinna, hevur gjørt og eina sera vakra borðlampu.

# Harald Mydland møtirøð í Føroyum

**Harald Mydland, sum virkar saman við tí vælkenda norska heimsevangelistinum Aril Edvardsen, hevur møtir í Føroyum 25.-29. September**

HEIMAMISSIÓNIN
*Tíðindaskriv*

Møtini seta heimsmissión í miðdepulin. Seinastu 40 árini hevur norski evangelisturin Aril Edvardsen og hansara medarbeiðarar borið evangeliið, tey góðu tíðindini út til heimsins ónáddu fólkasløg.

Við stórum møtirøðum, prædikantseminarum fyri innføddar arbeiðarar, tí skrivaða orðinum, bíbliuskúlum, brævskeiðum, radio- og sjónvarpi røkkur missiónsfelagsskapurin Troens Bevis Heimsevangelisering nú runt roknað 200 tjóðum við evangeliinum, og er hetta meira enn nøkur onnur missión, vit kenna.

**Kunnu røkka øllum heiminum við sjónvarpi úr Sarons Dal**

Seinastu tíðina hevur Aril Edvardsen og Troens Bevis gjørt nógv við at senda evangeliið við fylgisveinasjónvarpi, og hava teir nú amboðini til at røkka øllum heiminum við evangeliinum frá høvuðsstøðini í Sarons Dal í Kvinesdal í Noregi.

Úr Sarons Dal verður nú dagliga sent yvir fylgisvein til Evropa, Norður Afrika, Miðeystur og vestara partin av Russlandi. Hyggjararnir verða síðani fylgdir upp við brævskeiðum á nógvum tungumálum.

Várið 2003 krøkir Troens Bevis seg upp á tann sokallaða Hotbird-satelittin, sum røkkur frá eysturstrond Ameriku til Mið Asia, India og vestara Kinesiska markið. Tá veksur hyggjarafjøldin við hundraðtals milliónum asiatiskum hyggjarum.

**Hevur vitjað Føroyar fleiri ferðir**

Bæði Aril Edvardsen og Harald Mydland hava vitjað í Føroyum fleiri ferðir, og missiónsfelagsskapurin í Sarons Dal er væl kendur millum føroyingar.

Einir 250 føroyingar (missiónsstuðlar) fáa í hesum døgum bræv úr Sarons Dal við persónligari innbjóðing til at koma á møtini hjá Harald Mydland, har tey fáa at hoyra seinastu tíðindini innan heimsmissión.

**Stór undur hendu í India**

Harald Mydland hevur stórar møtirøðir runt um í heiminum, og fyrireikar nú eina stóra møtirøð í India í vetur.

Seinast hann vitjaði India, í februar í ár, hendu nógv stór undur. Krabbameinssvullir hvurvu tá ið biðið var fyri sjúkum, deyv oyru vórðu latin upp, veikt síggjandi sóu klárt, stívir ryggir kundu boyggjast, og astma og allergi varð grøtt.

Ein kvinna við sera sterkari pínu í høgra armi, hevði gjørt av at taka seg av døgum. Men sama kvøld varð hon fullkomuliga grødd. Ein maður við einum stórum krabbameinssvulli á hálsinum varð grøddur, og svullurin hvarv undir forbønini.

Harald Mydland hevur eisini møtirøðir í Afrika, og var í august mánað millum høvuðstalararnar á prædikantkonferansuni sum samlaði pastorar og leiðarar úr øllum Kenya.





# Komu í neyð av góðveðrinum

**Sunnumorgunin kom Brimil á Klaksvík við einum belgiskum seglbáti. Báturin hevði maskinskaða og var á veg á Klaksvík. Komnir í Kalsoyarfjørð var stilli og tá seglini einki munaðu, fór Kittiwake, sum báturin kallast, at reka við streyminum. Kittiwake er 44 føtur langur. Við eru tveir belgiarar og 4 fransmenn**

FRÍTÍÐARSIGLING
*Rúna Sivertsen*



*unnumorgunin kom Brimil á Klaksvík við einum belgiskum seglbáti, sum hevði maskinskaða. Tá Kittiwake kom í Kalsoyarfjørð var stilli, seglini munaðu einki og báturin fór at reka við streyminum*
*Mynd: Rúna Sivertsen*

Mánadagin var Sosialurin umborð á seglbátinum, Kittiwake, sum liggur á Klaksvík við maskinskaða. Vit fingu eitt prát við belgiska skiparan, Poul Baguet og Anne Theben, sum eisini er úr Belgia.

Anne og Poul vóru serstakliga blíð og fryntlig, og skjótt kom kaffið í krússið.

Hon er lækni, og hann er verkfrøðingur. Anne hevur ikki verið í Føroyum áður, men hjá Poul er hetta 9. ferðin her.

- Av øllum teimum londum, vit hava vitja, dámar okkum Føroyar best, við undantak av veðrinum, siga tey.

Fólk eru sera fyrikomandi og blíð, halda tey. Poul, sum hevur upplivað eina ólavsøku, undraðist á, at so nógv drukkin fólk kundu vera so friðarlig og vinarlig.

Spurd, um tey hoyra saman, vildu tey einki vera við, at tey eru par. Men tá Anne í skemti varð spurd, um hon so hoyrdi til øll fimm mannfólkini umborð, svaraði hon kvikliga og flennandi: "I prefer Poul".

Kittiwake fór úr Nieuwpoort í Belgia tann 1. juli. Ferðin gekk upp við ensku strondini og víðari til Hetlands. Síðani gekk leiðin til Noregs og haðani yvir til Grønlands og víðari heilt upp til Spitsbergen.

Tá eykalutir eru komnir úr Belgia og maskinan umvæld, fer Kittiwake um Ongland aftur til Belgia.



*Anne Theben og Poul Baguet eru bæði úr Belgia. Við Kittiwake eru eisini 4 fransmenn; teir vóru ein túr í landi, tá Sosialurin vitjaði umborð*
*Mynd: Rúna Sivertsen*


